# Nøvn

**TØKK**

Hjartaliga takk fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, tá ið okkara høgt elskaði

**Christian Martin Matras**
**Klaksvík**

andaðist og varð jarðaður.

**Vegna tey avvarðandi**
***Thurid Fuglø Matras***

## Jógvan Purkhús 46 ár í jøklanna- og eldfjallannalandi

*Í døgunum 10. til 24. september vitjar Jógvan Purkhús, sum er ættaður úr Klaksvík, í Føroyum. Saman við undirritaða, sum hevur lagt ferðina til rættis, vitjar hann í fleiri samkomum, har hann talar og greiðir frá trúboðaravirki sínum í Íslandi hesi seinastu 46 árini.*



Jógvan er føddur og uppvaksin í Klaksvík, og er Klaksvíkingur í hjartanum við stórum K, men á pappírinum er hann Íslendingur við stórum Í. Jógvan er glaður fyri eisini at vera Íslendingur, tí tað var hetta landið, sum Harrin legði honum á hjarta sum ein blaðungur drongur, tá hann arbeiddi á bedingini hjá Kjølbro og gekk á møti í Betesda.

Petur Háberg, sum skrivaði og gav út blaðið Lív og Læra, skrivaði ofta tíðindatilfar og greinar um trúboðaramarkina í Íslandi. Í oktober-útgávuni í 1962 tekur Petur soleiðis til í oddagreinini: ...*"Fyri durum okkara liggur Ísland. Har eru so fáir í verki Harrans... Føroyingar fara til Íslands at sportast... hvussu nógvir fara fyri Harran? Kennir eingin seg kallaðan av Gudi at fara við hinum signaðu tíðindum til jøklanna og eldfjallanna land...?...Hvat gjørdi tað, um tað var ein timburmaður, ein skrivari, ein smiður, ein fiskimaður, ein rokskipari minni í Føroyum – bert tað var ein víngarðsmaður meir í Íslandi?*

### Kanna landið

Hetta hevði sterkt árin á unga tannáringin í Klaksvík, og eitt andaligt kall byrjaði at taka skap í hansara hugaheimi. Bert 19 ára gamal, í 1962, fór Jógvan til Íslands at kanna landið. Eyðun Eltør og Zacharias Zachariassen vóru eisini við í fylginum. Stór evangelisk fundarrøð var um hetta mundi í Reykjavík, við Kanadiska Prædikumanninum, Oswald Smith. Jógvan upplivdi á hesi ferðini at hoyra og síggja evangeliið verða kunngjørt fyri íslendingum, sum í stórum tali komu til møtini.

Longu árið eftir, í 1963, fer Jógvan aftur til Íslands. Hesaferð ger hann ein túr til dreingjaleguna við Ástjørn, sum liggur á Norðurlandinum. Á hesum túrinum fekk hann innlit í barnaarbeiði hjá samkomunum í Íslandi.

22. juni í 1964 siglir ferðamannaskipið Dronning Alexandrine av Klaksvíkini á veg til Íslands. Umborð er Jógvan, sum tá var vorðin 21 ára gamal. Aftaná tvær "kanningarferðir" til landið gjørdi hann av at fylgja kallinum og fara til Íslands, har hann giftist í 1965 og hevur búleikast í 46 ár. Hann giftist við Rósu, sum er fødd og uppvaksin á Akureyri. Tey eiga fýra børn, Jákup, Elsa, Anna og Dávid. Tey fyrstu árini búðu Jógvan og Rósa á Akureyri, men seinastu nógvu árini hava tey búð í Reykjavík.

Tey hava øll hesi árini hjálpt til á summarleguni við Ástjørn, har Jógvan hevur sæð nógvar Íslenskar dreingir og gentur, allastaðni frá í landinum, taka ímóti Jesusi. Hesi eru nú vaksin og eiga sjálvi børn, sum koma á summarlegu.

Umframt at hava virkað bæði í samkomuni á Sjónarhæð á Akureyri og í samkomuni í Nupalind í Reykjavík, so hava Jógvan og Rósa verið ein virksamur partur av felagsskapinum Gideonittarnir. Har var Jógvan skrivari í 5 ár. Ígjøgnum hendan felagsskapin hevur hann verið við til at býtt út bíbliur og nýggja testamentir á hvørjum ári til túsundir av Íslenskum skúlabørnum.

Jógvan og Rósa høvdu í fleiri ár eina sending í kristiligu útvarpsstøðini í Reykjavík, LINDIN. Sendingin var annanhvønn sunnumorgun kl.09.00 har tey spældu tónleik, høvdu eitt orð út frá bíbliuni og tóku ímóti bønarevnum beinleiðis í telefonini. Í dag hevur Jógvan einaferð um mánaðin dagsins orð á hesi somu radiostøð.

### Fyrsti trúboðarin

Hesi 46 árini hava boðið upp á mangt og hvat, og ikki hevur móti altið verið so gott. Í sjeytiárunum var tað vanligt, at ungdómar í samkomunum fóru í stórum bólkum yvir til Íslands at býta traktatir út. Tá var tað altið Jógvan, sum tók ímóti og sum fyrireikaði hesar ferðir. Tey, sum vóru ung í brøðrasamkomunum í sekstiárunum, minnast henda unga Klaksvíkingin, sum fór til Íslands at virka. Fyri mong av teimum varð hann ein fyrimynd, ikki minst av tí, at hann var fyrsti trúboðaðri í brøðrasamkomuni, í nýggjari tíð, sum fór úr Føroyum í annað land at virka sum trúboðari.

Jógvan hevur ikki gjørt nógv av at ferðast hendavegin at vitja samkomurnar seinastu nógvu árini, og tað nýggja ættarliðið í samkomuni hevur neyvan møtt Jógvani. Tí hevur tað ligið leingi í kortunum at boðið Jógvani at vitja samkomurnar burturav. Hann hevur ofta borið seg undan, men í vár eydnaðist tað at fáa hann at játta at koma.

Jógvani kemur ikki at hava tey stóru møtini við stórum talum, men heldur ynskir hann at vitja samkomur, hava samfelag við Guds fólk og luttaka á møtinum, og greiða eitt sindur frá verki Harrans í Íslandi og hava eitt orð frá skriftini. Jógvan sigur, at hann vónar, at onkur fær lagt á hjarta, ígjøgnum hansara vitjan í Føroyum, at virka sum trúboðari í Íslandi, nú hann sjálvur er vorðin 67 ára gamal. Ein slíkur skal vera meiri enn vælkomin, sigur Jógvan.

Tað er í hesum døgum júst 40 ár síðani Brynleif Hansen vitjaði í Íslandi og hevði møtir saman við Jógvan Purkhús. Jógvan minnist við stórari virðing hesar seinastu tvær vikurnar saman við Brynleifi í orðsins tænastu, sum eisini vórðu Brynleifsa seinastu tvær vikur í orðsins tænastu. Jógvan kemur eisini inn uppá hetta í samrøðuni í IKTUS, sum verður send í november.

Møti í Berøa í Saltangará sunnukvøldið 12. september verður sent á kristiligu sjónvarpsrásini IKTUS annað vikuskiftið í oktober. Ein samrøða við Jógvan verður send í IKTUS annað vikuskiftið í november.

Tey, sum ynskja at vita meiri um vitjanina og møtini kunnu seta seg í samband við Poul Jóhan Djurhuus, Glyvrar tlf: 228314 ella gjaranes@olivant.fo

**Poul Jóhan Djurhuus**

---

**80 ára føðingardagur**

Sunnudagin 12. sept. fylti Petur Danielsen, Hósvík, 80 ár. Dagurin verður hildin 23. sept. á Giljavegi 40 frá kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**80 ára føðingardagur**

Í dag 20. sept. fyllir Poula Isaksen á Stongunum, Klaksvík, 80 ár. Hon er burturstødd føðingardagin.

**75 ára føðingardagur**

Mánadagin 20. sept. fyllir Tórfinnur Hansen, Skála, 75 ár. Hann er burturstaddur føðingardagin.

## Nøkur nøvn vanta enn

Herfyri høvdu vit hesa myndina í blaðnum og søknaðust eftir navninum á skipinum og á manningini. Vit hava nú fingið fleiri upplýsingar frá einum av lesarum okkara. Skipið er Atlantsfarið, og vit hava fingið nøvnini á fleiri av manningini.

Fremsta rað frá vinstru: 1. Sigurd Andreassen, Leirvík, 2. Eyolvur Gislason (garnabassur úr Íslandi), 3. Meinhard Heinesen, Leirvík, 4. Jóan Sigurd ?, Funningur, 6. Poul Akraberg, Vestmanna, 7. Jógvan Isaksen, skipari og eigari av Atlantsfarðinum (pápi Finnboga Ísaksson, løgtingsmann, sála)

Miðraðið frá vinstru: 2. Hjalmar Heinesen, Leirvík, og 3. Martin Rólantsá, Leirvík.

Aftasta rað frá vinstru: 1. Jóan Petur í Hoygarðinum, Leirvík, 3. Óli hjá Guttorm, Leirvík, 4. Hilmar Ellingsgaard, Eiði, 5. Absalon Justiniussen, Leirvík, og 6. Esmar Fjallstein, Leirvík.

Nøvnini sum vit vanta eru hesi:

Hvørjir eru menninir ið sita sum nr. 5 og nr 8 í fremsta rað frá vinstru?

Hvør er maðurin ið situr sum nr. 1 í miðraðnum frá vinstru?

Hvørjir eru menninir ið sita sum nr. 2, nr. 7 og nr. 8 í aftasta rað frá vinstru?

Um onkur av lesarum okkara kennist við nøvnini, sum vanta á myndina ella hevur okkurt at viðmerkja, er viðkomandi vælkomin at senda teldupost til Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo



*Bliantstekning av Atlantsfarinum teknað av Jóhan Petur Jacobsen í Vestmanna*